VIÐMERKINGAR

# Sendið tey røttu at ummæla filmar

ÁRNI VANG

Læs eitt filmummæli hjá Kim Simonsen um MI 3 í Sosialinum í dag. Eg vil beinavegin geva honum rætt í, at MI 3 ikki eru teir »djúpastu« filmarnir, ið eru gjørdir. Menn sum Arnold Schwarzenegger, Bruce Willis, Jacke Chan o. a. fara nokk ongantíð at vinna ein Oscar fyri teirra leiklut í actionfilmunum.

At ein acitonfilmur er lættisoppa, tómt, uttan innihald o. s. v er ikki neyðugt hjá Hr. Simonsen at skriva eina langa svadu um, áðrenn hann fer at »ummæla«, í hesum føri, MI 3. Vit vita øll, og eru einig við Hr. Simonsen at actionfilmar ikki ríka okkum dagin ella nakað. Men tú fer sum ummælari til MI 3 og skal ummæla filmin í samband við aðrar actionfilmar av hasum slagi og ikki koma við onkrari langari svadu, hvussu vánaligir actionfilmar eru. Tín persónliga meining um eina filmsgenru kanst tú brúka eina heila blaðsíðu onkran annan dag, og vit vita, at tú hevur ikki trupulleikar at skriva lesarabrøv. Skrivi hetttar av tí orsøk, at eg haldi eisini Sosialurin skal líka senda røttu filmsummælararnar niðan í Havnar Bio. Kim Simonsen t. d. til onkra filmsgenru, ið honum dámar og hevur eina ávísa vitan um, tí so kann hann koma við konstruktivum kritikki. At senda Kim Simonsen í Havnar Bio at ummæla actionfilmar gevur líka nógva meining sum at senda ein prædikumann at ummæla ein pornofilm. Sjálvur havi eg ikki sæð MI 3 ENN, men gleði meg tann dagin eg fari í Havnar Bio og fái totalt heiladeyðan undirholdning, við somu good guy - bad guy bardøgunum, har kvinnan (og tær eru altíð lekrar) entin er ónd, ella hevur brúk fyri hjálp frá okkara mannliga superhetju. Vónandi fer Kim ikki at seta seg niður nú og skrivar eitt laaaaaaaangt aftursvar til mín, ið eg skal brúka ein heilan seinnapart til at lesa, og bæði kvøld og nátt at analysera fyri at fáa skil á hvat hann hevur sagt. Er ikki eitt persónligt álop á teg, men konstruktivur kritikkur og einki annað. Og vónandi fer tú við somu hugsjón, altso konstruktivan kritikk og ikki persónligt álop, næstu ferð tú skal ummæla ein film. Haldi sjálvur at tú hevði kunnað givið eitt framúrskarandi ummæli til Da Vinci Code, men av orsøkum, ið vit øll kenna (og allur heimurin), so ber tað ikki til.

# Føroyar og mannarættindini

HERGEIR NIELSEN
løgtingsmaður



Brot á mannarættindini er ein álvarsamur spurningur, og Amnesty International er farið til løgmann at sóknast eftir, um CIA hevur flutt fangar í føroyskum loftrúmi.

Víst verður á, at føroyska deildin hjá Amnesty International fyri hálvum øðrum mánað síðani bað landsstýrið virka fyri at steðga fangaflutninginum, tí hann stríðir ímóti altjóða reglunum um mannarættindi.

Felagsskapurin vísti í hesum sambandi á eina frágreiðing, sum gav ábendingar um, at eitt loyniligt flogfar hjá CIA hevði verið í føroyskum loftrúmi í oktober í fjør.

Føroyar eru sostatt í altjóða kikaranum, og verða møguliga ákærdar fyri brot á mannarættindini.

Hóast vit einki málsræði hava á økinum, fingu vit hóvið til at spæla fólk í húsi, tá vit viðgjørdu spurningin um flúgving í føroyskum loftrúmi.

Málið varð viðgjørt í uttanlandsnevndini 15. februar, og frásæð undiritaða tók ein samd nevnd undir við at geva hetta loyvið.

Síðani vit fingu Fámjinsskjalið er ferðin á føroyskum verju- og trygdarpolitikki væl minni, og sást hetta týðiliga, tá Embassy of the United States of America, tann 21. nov. 2005 sendi umsókn til danska uttanríkismálaráðið um loyvi til flúgving í føroyskum loftrúmi við flogførum við vandamiklum góðsi.

Meira enn tveir heilar mánaðir aftan á at umsóknin varð send, tók løgmaður seg saman til at ráðføra seg við uttanlandsnevndina, sbr. stýrisskipanarlógini § 54, um at loyva amerikanskum flogførum at flúgva ígjøgnum føroyska loftrúmið og at lenda við skaðiligum farmi fyri árið 2006.

Sjálvandi varð tað átalað, at málið ikki kom í Uttanlandsnevndini fyrr enn meira enn tveir mánaðir aftaná, at umsóknin var send okkum.

Um nøkur flúgving longu var farin fram hetta tíðarbil, vistu hvørki vit ella løgmaður nakað um.

Málið var illa lýst, og fyrst og fremst vistu vit ikki, um henda flúgving var í samsvari við føroysk áhugamál ella ikki. Mælt var tí frá at geva hetta loyvið.

Í minnilutatilráðingini varð eisini víst á, at flúgving í føroyskum loftrúmi við vandamiklum góðsi, sum m. a. skuldi brúkast í krígnum í Irak, og loftvegis flutningur og píning av fangum og mannarættindi teirra, eru ógvuliga viðkvom og nógv umrødd mál aðrastaðni í heiminum, har altjóðaagerðin hevur flutt okkum munandi nærri hvørjum øðrum.

Víst varð so sjálvandi eisini á, at nógva stásið, ið gjørt varð burtur úr Fámjinsskjalinum um innlit og ávirkan á uttanríkis- og trygdarpolitisk viðurskifti, ikki vísti seg vert tað pappír, tað varð skrivað á.

Í hesum skjali varð kólað óført uppiyvir føroyskum rættindum úteftir, so sum:

"at Færøerne medinddrages og har medindflydelse, ...ægte medinddragelse og medindflydelse."

Greitt er, at als eingi frambrot hava verið í føroyskum uttanríkis- og trygdarpolitiskum áhugamálum, heldur hinvegin. Veruleikin er, at alt var ein sjónleikur, tá til stykkis kom.

Danir røkja framvegis síni áhugamál á hesum øki, eins og teir altíð hava gjørt tað.

"Skæg for sig, og snot for sig," sum Hørup vildi sagt tað.

Tað sindrið vit einvegis frætta, verður framvegis faksað løgmanni umvegis ríkisumboðsmannin, og sett á dagsskrá, tá tað er íligið ein mánaða ella meir.

Á fundinum varð so eisini sóknast eftir, hvørja last hesi flogfør høvdu, men svar fekst einki.

Próvfast er, at løgmaður hvørki hevur ella fær nakað, sum kemur nær námindi nøkrum, sum kann kallast "-ægte medinddragelse og medindflydelse."

Heimastýrið hevur sligið seg til tols við, at ein fundur í ein tíma í einum ári við einum donskum ráðharran, er nóg mikið til at tryggja føroyingum innlit í føroysk áhugamál á uttanríkis- og trygdarpolitiska økinum.

Amnesty International fær tí neyvan nakað stórvegis at vita frá løgmanni.

Kemur felagsskapurin síðani til ta niðustøðu, at Føroyar hava virkað fyri brotum á mannarættindini, hava vit eina álvarsama søk fyri framman.

# Fuglakrím og høsnalortur!

JENS-KJELD JENSEN
Nólsoy



Eg trúði hvørki mínum egnu eygum ella oyrum, tá eg sá sendingina "Urtagarðurin" hóskvøldið.

Í sendingini kom framm, hvussu gott tað var at nýta innfluttan høsnalort at tøða rhodendendrum við, hóast viðmerkt var, at føroyskt høsnatøð saktans eisini kundi nýtast!

Allar kanningar higartil prógva, at fuglakrím hevur spjatt seg á leiðunum, har millum annað høsnatøð hevur verið innflutt.

Fuglakrímsvirusið kann liva í høsnatøði í minsta lagið 100 dagar!

Nú veit eg ikki, um hetta innflutta høsnatøðið er hitaviðgjørt; men hóast tað skuldi verið tað, er tað nærum sum at spæla krógva og blunda, havandi í huga tær strongu reglur, sum mynduleikarnir annars standa klárir at seta í verk, skuldi ein deyður fuglakrímsfongdur fuglur dottið niður av himni...

Hvussu í verðini kann landsdjóralæknin lata hetta fara framm við borðinum, tá hann annars bert hevur "málað fanan á veggin" viðvíkjandi tí óskylduga flytifuglinum, sum mær vitandi ongantíð hevur smittað menniskju?

Skuldi hann fyri ikki fyri langari tíð síðan havt kannað, um hesin óneyðugi innfluttningur fór framm og sjálvsagt steðga honum?

Tað skuldi verið óneyðugt at innflutt høsnatøð til stóran vanda fyri heimafugl, bert til tøða nakrar runnar – tað skuldi hvør havaeigari kunna fingið á Velbastað – hóast "posarnir møguliga so ikki vórðu líka litfagrir…

Við undran!

# Borgararnir í Haraldssundi fáa ongar sømdir

JÁKUP JACOBSEN
kommunustýrislimur í Kunoyar kommunu



**Leiguøkir:** Í ár hava 4 umsóknir verið viðgjørdar í Kunoyar kommunu, har ynskini hava verið at fingið økir við bátahylin í Haraldssundi. Tvær umsóknir vóru úr Klaksvík, og tvær vóru úr Haraldssundi. Báðar umsóknirnar úr Klaksvík vóru samtyktar, men báðar umsóknirnar úr Haraldssundi fingu noktandi svar.

Økið, sum Klaksvíkingar hava fingið til leigu á økinum er umleið 1280 fermetrar tilsaman.

Vit í Haraldssundi standa spyrjandi í hesum málinum.

Kann tað henda seg at orðsøkin er, at annar umsøkjarin eitur Jákup Jacobsen. Hann hevði søkt um at fáa eitt økið við bátahylin uppá 370 fermetrar til eina vinnuhøll. Her mugu vit ásanna, at vinnulívið í Kunoyar kommunu, ikki er høgt í metum. Kunoyar kommuna hevur einki hóskandi øki at vísa á. Um ein borgari í Kunoyar kommunu, skal fáa nakað øki, má hann á knøunum til Klaksvíkar kommunu, tí ikki er pláss fyri honum í Kunoyar kommuni.

Hvussu fer Kunoyar kommuna, at viðgerða aðrar umsóknir, tá talan er um vinnulívið? Hvat er orðsøkin? Hvat er grundin? Klaksvíkingar hava aftur hesaferð fyrsta rætt í Kunoyar kommunu. Um nakar hevur hug, at hyggja eftir atkvøðugreiðsluni í hesum máli, so letur tað seg ikki gera, sjálvt um hetta eigur at verða kunngjørt sambært lógini.

Um Kunoyar kommuna hevði røkt sína skyldu og kunngjørt úrritið úr gerðabókini fyri hendan fundin, so hevði tú ikki kunnað sæð, hvør atkvøddi hvat, tíverri. Uttan at koma nærri inn á hetta mál, so veit boprgarstjórin Heini O. Heinesen, hvør tók hesa avgerð. Tá hetta málið var fyri, var tað sum tá børn spæla: "Fólk í húsi." Eg vil minna kommunustýrislimirnar á, at tað er teirra skylda, at viðgera eitt mál, og atkvøða út frá síni bestu sannføring. Tað er okkara skylda at syrgja fyri, at allir okkara borgarar í Kunoyar kommunu, verða viðgjørdir eins, og vit mugu samstundis ansa eftir, at okkara øvundsjúka ikki tekur ræði, og yvirhálar okkara vit og skil í skeivari síðu.

Viðmerking til Heina O Heinesen:

Tá ið Heini O Heinesen sigur við Dimmalætting, at gerðabókin hjá Kunoyar kommunu, verður førd uppá punkt og prikkar, so kann eg vísa á lesarabrævið, ið eg hevði í Dimmalætting, har ið eg skrivaði, at nú verður gerðabókin skriva sum hon skal. Í hesum sambandi, kann eg siga, at tá eri eg ógviliga lagaligur, tí tú kanst ikki síggja, hvør atkvøður hvat, uttan so at ein av kommunustýrislimunum vil fáa hetta í gerðabókina, sum eina viðmerking.

Í somu viðmerking til Dimmalætting, sigur borgarstjórin, at tað var betri skil á Kunoyar kommun, enn á nógvum øðrum kommunum. Hesi orðini eigur Heini O Heinesen og um so er, at tað stendur verri til í hinum kommununum, so fær Innlendismálaráðið nokk at gera í komandi framtíð. Hinar kommunurnar kenni eg av góðum grundum einki til.

Úttalilsi hjá Heina O Heinesen í fjølmiðlunum:

Fyri stuttum hevði Pegasus eina samrøðu við Heina O Heinesen borgarstjóra, har hann fortaldi fyri Føroya fólki, at øll vóru vælkomin í Kunoyar kommunu, og at hann ikki gjørdi mun á fólki, og tað hevði hann ongan rætt til. Her fer borgarstjórin út um alt mark, tí tað kunnu fleiri umsøkjarar prógva, ið hava havt umsóknir hjá Kunoyar kommunu, og fingið noktandi svar. Grundgevingarnar hjá Kunoyar kommunu, hava ikki verið nøktandi, og alt ov lítið hevur verið gjørt við hesi mál, fyri at funnið loysnir, ið eina kommunu kann vera stolt av.